# ÓHAPPIÐ HENDI AV LETI

**Ein lastbilaførari noyðist helst í rættin, tí hann ikki festi bingjuna, sum koppaði av lastbili hansara sunnudagin**

Randi Jacobsen

Tað eru ikki mjúk orð, sum politiið í Havn hevur at siga um eitt ferðsluóhapp við Hoyvíksvegin í Havn stutt fyri middag sunnudagin.

Ein lastbilur viðfestisvogni og bingju omaná snaraði av ringvegnum inn á Hoyvíksvegin. Í tí hann snaraði, koppaði bingjan av viðfestivogninum og endaði við at liggja á gongubreytini. Í ferðini koppaði hann eisini einum lyktasteyra.

- Vit hava sæð slík óhapp áður, og óhappini stavast tí reina leti, sigur politiið.

Sipað verður til, at bingjan ikki varð fastspent. Hon eigur at verða spent við fýra hektum, og tað tekur ikki langa tíð at gera.

Bilførarin var heppin, at eingi fólk gingu á gongubreytini beint nú. Hevði bingjan rakt fólk, vóru tey ikki komin frá óhappinum við lívinum.

Bilførarin verður skuldsettur fyri brot á ferðslulógina við ikki at hava tryggjað bingjuna. Í líknandi óhappum hevur revsingin verið antin treytaleys ella treytað frádøming av koyrikortinum.





## Hýsa fær lítlan prís

*Hýsa hevði lítlan prís á søluni hjá Fiskamarknaði Føroya í morgun. Stívliga 2 tons vóru seld av hýsu 2, og her var miðalprísurin einans 10,50 krónur fyri kilo. Tað er vánaligur prísur á hýsu*

Vilmund Jacobsen

Fiskamarknaður Føroya seldi í morgun góð 48,5 tons av fiski fyri slakar 549.000 krónur. Hetta gevur ein samanlagdan miðalprís fyri øll fiskasløgini á 11,31 krónur fyri kilo.

Ein fittur partur av samlaðu nøgdunum í morgun var hýsa, góð 19 tons tilsamans. Men prísirnir á hýsu vóru einki av reypa av í dag. Teir vóru meiri at kalla vánaligir.

Góð 12 tons vóru av hýsu 2, sum bert fekk 10,50 krónur í miðal fyri kilo. Góð 6 tons vóru á hýsu 3, og her var miðalprísurin heilt niðri á 9,53 krónur fyri kilo.

Lítil toskur var á marknaðinum í morgun, umleið 2,5 tons tilsamans. Mest var av toski 3, stívliga 1,3 tons tilsamans, og her var miðalprísurin 14,43.

### Onnur fiskasløg

Umleið 5,5 tons vórðu seld av brosmu, og besti miðalprísur fyri brosmu var 6,86 krónur fyri kilo.

3,5 tons vóru av kongafiski, og her var besti miðalprísur 11,86.

Umleið 2,5 tons vóru av havtasku, sum plagar at hava rímiliga góðan miðalprís. Besti havtaskuprísur í dag var 25,81.

At enda kunnu vit nevna eitt tons av svartkalva, sum á uppboðssøluni hjá Fiskamarknaði Føroya í morgun fór fyri miðalprísin 24 krónur fyri kilo.

## Í MORGIN

6/9 °C




Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útnyrðingi og ælingur,men eisini sólglottar. Hitin millum 6 og 9 stig – mikunáttina niður í 3 stig.

## MIKUDAGIN

3/6 °C




Lot til andøvsgul av norði, seinnapartin upp í ein strúk av landnyrðingi. Sólglottar, men eisini okkurt ælið. Hitin millum 3 og 6 stig.

## HÓSDAGIN

3/6 °C




Lot til andøvsgul av landnyrðingi, seinnapartin lot av ymsum ættum. Yvirhøvur turt og sóglottar og hitin millum 3 of 6 stig.

**Veðrið fríggjadagin og leygardagin:**
Fríggjadagin lot av ymsum ættum, turt og sólglottaar. Leygardagin frískar hann vindi av suðri og møguliga regn. Hitin millum 4 og 8 stig.

## LUFTTRÝSTIÐ




**Síðstu nátt:**
Eitt lágtrýst, 982 hPa. vestan fyri Írland kemur hendavegin og dýpist.




**Komandi nátt:**
Lágtrýstið skamt eystanfyri Føroyar fer spakuliga í landnyrðing og gevur kalt høgættarák á okkara leiðum.

## HITALAG




## AVFALL




Miðal: 70 mm

### Hitalagið kring knøttin



**Petur Skeel Jacobsen** greiðir frá um veðrið

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Nuuk** | -9 | **Tromsø** | -1 | **Moskva** | -13 | **Athen** | 14 |
| **Reykjavík** | 8 | **Bergen** | -2 | **Berlin** | -6 | **Beijing** | 11 |
| **Tórshavn** | 7 | **Oslo** | -9 | **Paris** | 3 | **New Dehli** | 20 |
| **Lerwick** | 4 | **Stokkhólm** | -6 | **Madrid** | 15 | **Bangkok** | 32 |
| **Aberdeen** | 7 | **Keypmannah.** | -4 | **Róm** | 11 | **Sydney** | -- |
| **London** | 8 | **Helsinki** | -19 | **Malorca** | 15 | **New York** | 2 |

## VESTFALLSKYRRINDI

15. mai Mánin næstur jørðini
17. mai Fullmáni
24. mai Seinna kvarter
27. mai Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2011

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 23. mai | - | 12:19 | 11:19 | 23:54 | 11:34 | - | 01:57 | 14:19 | 02:57 | 15:19 | 10:34 | 23:09 | 09:34 | 22:09 | 00:12 | 12:34 | 01:12 | 13:34 | - | 12:04 | 00:57 | 13:19 |
| 24. mai | 00:54 | 13:29 | - | 12:29 | 00:09 | 12:44 | 02:54 | 15:29 | 03:54 | 16:29 | 11:44 | - | 10:44 | 23:18 | 01:09 | 13:44 | 02:09 | 14:44 | 00:39 | 13:14 | 01:54 | 14:29 |
| 25. mai | 02:03 | 14:37 | 01:03 | 13:37 | 01:18 | 13:52 | 04:03 | 16:37 | 05:03 | 17:37 | 00:18 | 12:52 | 11:52 | - | 02:18 | 14:52 | 03:18 | 15:52 | 01:48 | 14:22 | 03:03 | 15:37 |
| 26. mai | 02:56 | 15:16 | 01:56 | 14:16 | 02:11 | 14:31 | 04:56 | 17:16 | 05:56 | 18:16 | 01:11 | 13:31 | 00:11 | 12:31 | 03:11 | 15:31 | 04:11 | 16:31 | 02:41 | 15:01 | 03:56 | 16:16 |
| 27. mai | 03:35 | 15:55 | 02:35 | 14:55 | 02:50 | 15:10 | 05:35 | 17:55 | 06:35 | 18:55 | 01:50 | 14:10 | 00:50 | 13:10 | 03:50 | 16:10 | 04:50 | 17:10 | 03:20 | 15:40 | 04:35 | 16:55 |